# Spurningar og svar um tvingsilssølur

### 1. Ber til at síggja fastognina áðrenn tvingsilssøluna?

Ja, tú kanst venda tær til advokatin, sum hevur skrivað søluuppsetingina.

### 2. Hvat skal ein hava við sum trygd fyri at sleppa at bjóða á einari tvingsilsølu?

Í minsta lagi 5.000 kr. í reiðum pengini ella eitt skrivligt skjal, har advokaturin sigur seg kunna svara fyri trygdini. Viðmælt verður at seta seg í samband við advokat hins málskrevjandi fyri at fáa neyvari svar um neyðugu upphæddina.

### 3. Hvat skal ein hava við, um ein bjóðar fyri onnur á tvingsilssøluni?

Bjóðar tú fyri ein annan, skalt tú hava frumritið av einari skrivligari fulltrú. Bjóðar tú fyri eitt felag, skalt tú bæði hava fulltrú frá viðkomandi við tekningarrættinum umframt eina tekningarútskrift frá Skráseting Føroya, ið ikki er eldri enn 2 vikur.

### 4. Skal hægstbjóðandi á tvingsilsøluni beinanveg veita fulla trygdina?

Nei, kravt verður í minsta lagi 5.000 kr. í reiðum peningi á tvingsilssølufundinum, og síðan fær viðkomandi vanliga eina viku sum freist til at veita fútarættinum fullu trygdina, vanliga við bankatrygd.

### 5. Ber til at sleppa undan at veita fullu trygdina við at lata fútarættinum tær samtykkisváttanir (gjaldskvittanir), sum ein hevur fingið áðrenn freistina?

Bert um tú klárar at lata rættinum allar samtykkisváttanirnar, áðrenn freistin er úti, men annars ikki.

### 6. Nær verður ein veitt trygd leysgivin?

Tá fútarætturin hevur fingið frumritini av samtykkisváttanum frá øllum veð- og úttøkuhavarum, sum hava fingið fulnað á tvingsilssøluni, umframt aloftast eisini frá kommununi og brunatryggingarfelagnum hjá fastognini.

### 7. Nær skal fyrrverandi eigarin flyta út úr fastognini, sum bleiv seld á tvingsilssøluni?

Tá fulla trygdin er veitt, og fútarætturin hevur givið endaligt hamarsslag, fær keyparin rætt til at fáa atgongd til fastognina og til at biðja fyrrverandi eigaran flyta út. Keyparin skal skrivaliga geva fyrrverandi eigaranum t.d. 14 dagar sum freist til at flyta út í. Er viðkomandi ikki fluttur út tá, kann keyparin biðja fútarættin um hjálp til at seta fyrrverandi eigaran út.

### 8. Hvussu fær keyparin skeyti fyri fastognina?

Eftir umbøn letur fútarætturin keyparanum uppboðsskeyti, tá keyparin sendir fútarættinum:

- Frumritini av samtykkisváttanum frá øllum rættindahavum, sum fingu fulnað
- Frumritini av samtykkisváttanum frá øllum rættindahavum, sum eiga áogn afturat boðsupphæddini – hetta verður rópt mestaupphæddin
- Møguligt flutningsskeyti (transportskeyti), um rætturin til at fáa skeyti fyri fastognina er avhendur eftir tvingsilssøluna

Keyparin skal sjálvur syrgja fyri at tinglýsa uppboðsskeytið og í hesum sambandi gjalda tinglýsingargjaldið og biðja um at fáa strikað rættindi, sum eru heilt ella partvíst uttan fulnað.